**Vestmanna skúli**
Toftavegur 12, FO-350 Vestmanna · Føroyar
Tlf. 298 470100 · Fax +298 470101 · e-mail: vestmanna@skulin.fo

# Lærarastørv í Vestmanna skúla

Tíðaravmarkað størv í Vestmanna skúla verða lýst leys til setanar frá **1. august 2006.**

**Søkt verður eftir 5 lærarum, fýra í fulltíðarstarv og einum í parttíðarstarv**
- fyri lærarar í farloyvi, barnsburðarfarloyvi, lækkað tímatal og avlopstímar

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Harumframt skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum:**
- undirvísa gentum og dreingjum í ítrótti og í svimjing, undirvísa á ítróttarbreyt og hava ítrótt sum linjulærugrein
- undirvísa í týskum og enskum
- undirvísa í náttúru/tøkni, alisfrøði og evnafrøði
- undirvísa í træ- og jarnsmíð og motorlæru
- undirvísa í rokning/støddfrøði vera flokslærarar

**Førleikakrøv:**
Lærarautbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Tó kunnu lærarlesandi, ið lúka prógv í summar, eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er Vestmanna skúli. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Størvini verða sett sum tíðaravmarkað størv fyri skúlaárið 2006 - 2007.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 8. mai 2006, kl. 16.00.**

Fleiri upplýsingar um størvini fært tú við at ringja til Vestmanna skúla tlf. 470100 ella til skúlastjóran tlf. 424449 ella við at senda teldupost til skúlastjóran olavur.winther@skulin.fo

**Vestmanna Skúli** hevur komandi skúlaár um 212 næmingar og um 24 lærarar.
Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/ves/

Vestmanna Skúli er kendur fyri at vera næmingavinarligur og grønur skúli. Skúlin arbeiðir annars í løtuni við hesum evnum: at menna trivnaðin, byrjanarundirvísingina, samstarvið við vinnulívið, tann opna skúlan og at geva næmingunum fjølbroyttar avbjóðingar.

SINNISBATI

## Fysiskur aktivitetur
## Fyribyrgjan og viðgerð av fólki við sálarbreki

Sinnisbati skipar fyri temadegi
í Kringluni í Norðurlandahúsinum
26. apríl frá kl. 09.00 - 15.30

Fyrilestrarhaldarar eru Jan Svensson og Aksel Gravesen, ið báðir arbeiða í ítróttarhúsinum fyri psykisk sjúk í Keypmannahavn.

Tilmelding er á telefon nr. 72 12 36 ella 21 10 16, eisini kann tilmelding fara fram við mail: sinnisbati@sinnisbati.fo

Kjak um fysiskan aktivitet í sjúkrahúsinum í Miðlahúsinum tann 27. apríl kl. 19

Øll eru vælkomin

Sinnisbati

## Tvingsilssøla av skipi

**Fríggjadagin 26. mai 2006, kl. 13.00,** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin **tvingsilssøla** yvir línuskipið **m/s »Ekliptika« XPZE, BRT 391, NRT 145.**

Skipið er bygt í 1977 á Kystvaagen Slip & Båtbyggeri, Noregi. Skipið er skrásett í Klaksvík í 2005.

Sambært skipaskrásetingini eigur P/f Ekliptika, undir Klakki 39, 700 Klaksvík, skipið.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni **fríggjadagin tann 5. mai 2006, kl. 13.30** og verður tann, ið metir seg at hava veð í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Sølan er umbiðin av **Óla Jákup Kristoffersen, advokati. Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145, (j. nr. 20060216), AS 11/2006,** sum kann geva nærri upplýsingar og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja skipið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Føroya Fútarætt.

**Føroya Fútarættur**
**27. mars 2006**




## VW Caravelle 2.5 til sølu

Árg. 11. februar 2000, Fýrahjólstrektur, DIESEL,
10 persónar, Leðursetur, Navigatión (GPS), Klima autm.,
Oljufýring o.m.a. Í sera góðum standi

**Selist um hóskandi boð fæst**

**TEL 31 98 48 ella 54 51 09**

Sosialurin 341800




# Ungdómsblað
# Mótasíður
## Heilsa og børn
# Hús og Heim

**Her fáa lýsarar eisini møguleikan at lýsa**
Ringið 341800 og spyr eftir Finnbjørg ella Teresu

miðlahúsið í Vágsbotni
Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel. 34 18 00
Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo
Sosialurin

FØROYAPRENT · TEL. 314 555